

# Skarvurin argar norðmenn

Seinastu árini hava vit í Føroyum harmast um, at so lítið hevur verið til av lomviga og lunda. Havhesturin royndist heldur ikki væl í heyst. Fuglurin var smáur og at síggja til eisini rak. Og tó; tað vóru eisini góðir fuglar ímillum, men svinnið hjá monnum, sum vóru á hesi veiði í august/september, var sum heild størri enn vanligt.

Í Føroyum verður ikki argast um lomviga, lunda, ei heldur skarv. Heldur harmast vit um, at fuglurin ikki hevur tað betri.

Skarvur hevur tó mangan argað í øðrum londum, eitt nú í Danmark, Svøríki og Noregi, tí tey meta, at fuglurin tekur væl av fiski og órógvar veiðina.

Fiskerlaget Sør í Noregi hevur soleiðis heitt á myndugleikarnar í landinum um at leingja tíðina, tá ið skarvur kann veiðast. Felagið vísir á, at skarvur etur nógvan smáfisk, sum heldur til fram við landi.

- Skarvurin hevur leingi verið ein sonn plága fyri svenskar og danskar fiskimenn, sigur felagið í Noregi.

Í Danmark er veiðitíðin frá 1. august til 31. mars, og nú vilja norskir fiskimenn eisini hava myndugleikarnar í landinum at leingja tíðina, sum skarvur kann skjótast í Noregi.

-vilmund.

# Wenzil vann lutakastið um fiskamerkini

**Fríggjadagin skipaði Fiskirannsóknarstovan fyri lutakasti millum innkomin fiskamerkir seinasta árið, har vinnarin fekk 10.000 krónur**



*Næmingar á Fiskivinnuskúlanum*

*Mynd: Eyðun Leo*

FISKAMERKIR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Lutakastið fór fram á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna, har Petur Steingrund, fiskifrøðingur helt "skálini" og Jákup Andrasen, skúlastjóri, tók upp úr henni.

Teir báðir syrgdu fyri, at alt gekk rætt fyri seg.

At geva virðisløn fyri fiskamerki, hevur verið fastur táttur hjá Fiskirannsóknarstovuni í nøkur ár.

Seinasta árið vóru innkomin tilsamans 408 fiskamerkir, sum vóru við í dráttinum um tær 10.000 krónurnar.

Hepni vinnarin hesaferð gjørdist 24 ára gamli, Wenzil Mouritsen í Sørvági, sum fær tær 10.000 krónurnar.

Tveir persónar høvdu latið flest merkir inn, nevniliga 19.

Flest merkir vóru frá persónum/virkjum á Toftum (59), Klaksvík (57) og Eiði (35).

Tilsamans 854 lutaseðlar vóru við í dráttinum. Orsøkin til, at talið av lutaseðlum var størri enn talið av innsendum merkjum er, at tríggir lutaseðlar luttaka, tá sjálvur fiskurin – og ikki bert merkið – er latin inn.

Umframt lutakastið um fiskamerkini, sum var á Fiskivinnuskúlanum fríggjadagin, var eisini ein framløga um havtasku á skránni.

Lise Ofstad, fiskifrøðingur, hevur í nøkur ár granskað ymisk viðurskifti í sambandi við havtasku, og hesum greiddi hon frá í síni framløgu (sí teigin á næstu síðu)



*Teir syrgdu fyri, at alt gekk rætt fyri seg*

*Mynd: Eyðun Leo*

# Útflytarar mistu pening, tí útflutningurin koksaði

**- Vit eru ógvuliga kedd um, at túrurin hjá Lómi mátti avlýsast, men hetta er nakað, sum tíbetur hendir ógvuliga sjáldan, sigur Jóhanna á Bergi, stjóri á Faroe Ship**



*Við tað at Lómur ikki sigldi til Scrabster mánadagin, vórðu 300 tons av feskum fiski á føroyska marknaðinum – meira enn »vanligt«*

ÚTFLUTNINGUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ætlandi skuldi Lómur hjá Faroe Ship fara til Scrabster mánadagin, men við tað, at skipið var seinkað á heimferðini úr Danmark, noyddist Faroe Ship at avlýsa túrin.

- Sambært ferðaætlanini skuldi skipið verið inn tíðliga mánamorgunin, men náddi ikki havn fyrr enn um kvøldið.

## Avlýstu Scrabster

Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship, sigur, at seinkingin mánadagin, sum stóðst av ringum veðri, førdi til, at tey noyddust av avlýsa Scrabster-túrin hesaferð, sum sjálvandi er komið fiskaútflytarum dátt við.

– Hetta er túrurin, har fiskaútflytarar senda feskan fisk niður til Scrabster, og tí var hetta ógvuliga óheppið, ásannar hon.

Hon leggur tó aftrat, at slíkt hendir ógvuliga sjáldan, tíbetur.

– Men vit eru ikki harrar yvir veðrinum.

## Á uppboðssølu

Sum Sosialurin hevur skilt, noyddust teir, sum annars ætlaðu sær at senda feska fiskin niður á skotska marknaðin, á uppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya við honum.

- Tað er einki at ivast í, at hetta hevur merkt munandi prísfall í mun til tað, teir kundu fingið fyri fiskin á feskfiskamarknaðinum í Skotlandi, sigur Jóhanna á Bergi.

Hon vísir á, at Dettifoss hjá Faroe Ship, sum kom úr Århuus, eisini var seinkað á ferðini heim til Føroya.

- Dettifoss skuldi verið komin sunnudagin, men kom ikki fyrr enn seinnapartin mánadagin, sigur Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship.




*Millum fiskasløgini á marknaðinum mánadagin var eisini djúpvatnsfiskur, sum skuldi av landinum*